# So bragdaði hjá NSÍ



**SKIFTU UM PLÁSS**

*NSÍ og AB skiftu um pláss í botninum, eftir tryggan heimasigur til runavíkingar*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen*

**VODAFONEDEILDIN Runavíkingar vunnu botndystin í Vodafonedeildini móti AB. Hóast talan varð um ein greiðan 3-0 sigur, so var tað ikki fyrr enn eftir fyrsta málið, at runavíkingar rættuliga fingu glið á spælið**

Ólavur Øre Hansen

| | |
|---|---|
| NSÍ | 3 |
| AB | 0 |

Tað var tíðiligt at tað vóru tvey lið uttan sjálvsálit, sum brustu saman við Løkin týskvøldið. Bæði NSÍ og AB hava fingið eina ringa byrjan uppá kappíngarárið, og tað sást aftur á vøllinum. Spælarnir tordu ikki heilt at bjóða av, og í staðin fyri at útfordra, so vóru nógvar »alibi« sendingar at síggja. Tó var Christian Høgni Jacobsen eitt undantak, hann royndi, uttan at nakað tó spurdist burtur úr.

Eftir eina heldur slaka byrjan uppá dystin, so fingu runavíkingar betur tak á dystinum. Nakrar ferðir eydnaðist teimum við skjótum og góðum spæli at koma ígjøgnum úti í síðunum, men innleggini høvdu ikki sama kvalitet sum uppspælið, og tí spurdist einki burtur úr. Tá ið so runavíkingar komu til málkjansir, so var neyvleikin ikki til staðar.

Argjamenn spældu nógv við longum sendingum upp til Stig-Roar Søbstad, men verjan hjá runavíkingum hevði fult tamarhald á norðmanninum, og tær fáu ferðirnar hann fekk eina sending aftur um verjuna, var Gango í NSÍ málinum vakin, og fekk skotið bóltin burtur av vandaleið.

## Forloysandi mál

Eftir hálvleiksteðgin tóku runavíkingar meira og meira yvir, men tað skuldi eitt heldur tilfeldugt mál til áðrenn vertirnir rættuliga fingu glið á spælið. Christian Høgni Jacobsen royndi seg við skoti, sum hevði farið fram við málinum, men inni í brotsteiginum stóð Klæmint Olsen, og hann setti fótin á, og bóltin sat í netinum.

Málið vísti seg at vera forloysandi fyri runavíkingar, sum rættuliga komu fyri seg. Spælið batnaði, og til tíðir minti spælið nógv um »góða gamla NSÍ spælið« við skjótum og tekniskum fótbóltsspæli. Leikliga yvirvágin hevði eisini við sær at komu runavíkingar fram til nakrar góðar málmøguleikar. Men tað var ikki fyrr enn 12 minuttir undan dystarloki, at NSÍ økti um leiðsluna, við einum máli, sum var meinlíkt fyrsta málinum. Einar T. Hansen royndi seg við skoti, ið rakti Heðin á Lakjuni, og snýtti Tórð í AB málinum. So var støðan 2-0.

Argjamenn royndi at flyta fólk upp í álopið, men har riggaði einki hjá gestunum. NSÍ verjan stóð stinn, og hevði ikki størvegis trupulleikar at avvísa gestunum. Í mun til vertirnar sum kundu spæla frítt eftir at hava lagt seg á odda, so leiktu argjamenn heilt uttan mið og mál í seinra hálvleiki, og tað sigur nógv um avrikið hjá argjamonnum, at teir ikki høvdu eina tí einastu kvalifiseraða roynd á NSÍ málið, í øllum dystinum!

Tískil var tað als ikki óuppiborið at runavíkingar øktu til 3-0, við máli sum hart arbeiðandi Christian Høgni Jacobsen skoraði, tá hann hegnisliga rundaði Aristide, og einsamallur móti málverjanum var ivaleysur, og setti bóltin trygt í netið.

Við sigrinum á AB, so kom NSÍ av aftasta plássi, sum sigursleysu argjamenninir nú hava.

*post@sosialurin.fo*

**NSÍ - AB** 3-0 (0-0)

**1-0: Klæmint Olsen, 56.**
**2-0: Heðin á Lakjuni, 78.**
**3-0: Christian Høgni Jacobsen, 90.**
Dómari: Petur Reinert

**NSÍ:** Andras Gango – Jonhard Frederiksber, Jens Joensen, Johann Troest Davidsen, Einar Hansen – Jann Martin Mortensen (65. min:Ólavur í Ólavstovu), Jústinus R. Hansen, Jann Ingi Petersen, Heðin á Lakjuni – Christian Høgni Jacobsen, Klæmint A. Olsen.

**AB:** Tórður Thomsen – Mortan úr Hørg, Gunnar Haraldsen, Tehe Aristide, Alex Mellemgaard –Dion Splidt, Evrard Ble, Kenneth Jacobsen, Fabrice Arnessan (59. min: Jobin Drangastein), – Nikolaj Eriksen, Stig-Roar Søbstad.




## Heðin á Lakjuni:

# Vit skuldu vinna

*– Vit vóru klárt bertra liðið, og vunnu fult uppiborið, segði ein av málskjúttunum hjá runavíkingum, Heðin á Lakjuni eftir dystin, tá Sosialurin fekk orðið á hann. Spurdur um fjáltur var á runavíkingur áðrenn dystin, tí teir høvdu fingið eins so ringa byrjan uppá kappingarárið, segði Heðin, at tað metti hann ikki.*

*– Eftir at vit komu á odda, so spældu vit rættuliga væl, segði Heðin, og legði afturat, at tað kennist gott at skora sítt fyrsta mál fyri runavíkingar í Vodafonedeildini, hóast tað var eitt sindur heppið.*